STARVSLÝSING

# STJÓRI TIL HAGSTOVU FØROYA

## Vilt tú standa á odda fyri og menna Hagstovu Føroya?

Hagstovan tekur pulsin á føroyska samfelagnum og hevur hagfrøðiligu vitanina um fólk, samfelag, vinnu, búskap og umhvørvi í Føroyum.

Hagtøl geva innlit og vitan til avgerðir, gransking og kjak, og eru ein týðandi lutur í einum og hvørjum framkomnum fólkaræðisligum samfelag.

Hagstova Føroya er almenni hagtalsmyndugleikin í landinum. Stovnurin virkar sambært løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991. Á stovninum starvast 19 fólk.

Sum stjóri á Hagstovuni skalt tú standa á odda fyri arbeiðinum á stovninum við:

- at raðfesta, hvussu stovnurin best møguligt nøktar tørvin á almennum hagtølum
- at leiða og menna starvsfólkið á Hagstovuni
- at savna inn datagrundtilfar, gera og almannakunngera hagtøl um samfelagsviðurskifti og gera hagfrøðiligar greiningar og forsagnir
- at veita fyrisiting, kommunum, fyritøkum, feløgum o.ø. hagtalstænastur
- at skipa fyri og gagnnýta hagskráir hjá almennum myndugleikum, ið verða nýttar í almennu fyrisitingini og í vinnuni, og sum kunnu nýtast til hagfrøðilig endamál
- at hava altjóða hagtalssamstarvið undir hond

**Førleikakrøv til stjóran á Hagstovuni**

- Hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni innan búskaparfrøði, hagfrøði ella samfelagsfrøði
- Leiðsluroyndir og/ella leiðsluútbúgving
- Góð samstarvsevni og mennandi leiðslustíl
- Royndir innan hagfrøðiliga virkisøkið eru ein fyrimunur.

**Setanarviðurskifti**

Starvið er tænastumannalíknandi starv, flokkað í 38. lønarflokki hjá Felagi Tænastumanna Landsins. Eftirlønargjaldið er 15%. Setanarøkið fevnir um Fíggjarmálaráðið, stovnar undir ráðnum, Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini.

**Umsókn**

Umsóknir við útbúgvingarprógvum, lívsgongdarlýsing og møguligum viðmælum skulu stílast Bjarna A. Bjarnason, aðalstjóra í Fíggjarmálaráðnum, og sendar sum teldupostur til: bab@fmr.fo.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 3. februar 2017. Starvið verður sett frá 1. apríl 2017 ella eftir avtalu. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Bjarna A. Bjarnason, aðalstjóra, á telefon 352020 ella Sigurd Poulsen, fráfarandi stjóra, á telefon 352850. Sí eisini heimasíðuna hagstova.fo.

sansir.fo

Fíggjarmálaráðið, Tinganes
Postrúm 2039
FO-100 Tórshavn

Tlf: +298 35 20 20
fmr@fmr.fo
www.fmr.fo

**FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ**
MINISTRY OF FINANCE